# VÁGA KOMMUNA

## KUNNINGARSKRIV 2011



Nú 2011 er farið aftur um bak, fara vit eins og undanfarin ár í stuttum at greiða borgarum okkara frá gongdini í kommununi farna árið, tí triðja hjá ***Vága kommunu***.

Sum greitt frá í kunningarskrivinum í fjør, hevur samstarvið millum kommunustýrislimirnar verið sera gott. Hetta er eisini galdandi fyri starvsfólkið hjá kommununi, bæði hjá teimum, sum arbeiða inni sum úti.
Stór orka er løgd í at samskipa arbeiðið í kommununi. Nú er tað mesta við at vera komið uppá pláss.

**Høvuðsmálini** hjá hesum kommunustýrinum hava verið og eru at samansjóða kommununa, og virka fyri trivnaði og framburði. Her skal verða betur at búgva í Vága kommunu, tá hetta valskeiðið er runnið, enn tá tað byrjaði. Bygdirnar skulu verða bæði ruddiligari og vakrari, enn tá hetta kommunustýrið tók við.

**Tað liggja sera stórar avbjóðingar fyri framman. Nevnast kunnu:**

- **Skúlamálið**. Soppavøkstur var í 2009 staðfestur á skúlanum á Giljanesi. Eftir gjølla at hava umhugsað málið, hevur kommunustýrið avgjørt at taka gamla skúlabygningin niður, og byggja nýggjan skúla ístaðin. Kommunan er nú í ferð við at ogna sær lendi til byggingina. Prosjekteringin av nýggja skúlanum er komin væl áleiðis. Prosjektuppskotið er gjørt og fyrsti parturin av arbeiðinum verður boðin út um hálvan januar. Fyrsti parturin fevnir um jørðarbeiðið og um niðurtøku av tí partinum av verandi bygningi, sum ikki er í brúk longur. Fyri at nøkta bráðfeingis hølistørvin, eru fleiri skúlaflokkar tíverri noyddir at húsast ymsastaðni í kommununi, inntil nýggi skúlin verður tikin í brúk.
- **Endalig loysn á kloakk viðurskiftunum.** Landsstýrið hevur ásett, at í seinasta lagi í 2015 skulu allar kloakkir leggjast út á streymasjógv. Kommunan hevur í ár lagt allar kloakkirnar, sum runnu á sjógv við Innaru Bryggju, út á streymasjógv.
- **Grundstykkir**. Eftirspurningurin eftir grundstykkjum er minkaður seinnu árini. Kommunan eigur í løtuni 12 byggibúgvin grundstykkir, 4 í Miðvági og 8 í Sandavági. Kommunan arbeiðir við at gera eina nýggja útstykking eystanfyri Gjónna Heimaru í Vatnsoyrum og eina norðuri í Heiðum í Miðvági. Arbeiðini verða útboðin fyrsta dagin. Í nærmastu framtíð fer kommunustýrið at ogna sær lendi til útstykking í Sandavági.
- Felags **bingjupláss** verður gjørt undir havnarberginum á Innaru Bryggju. Betongarbeiðið er boðið út. SP/f Dalsbø skal gera arbeiðið. Ætlanin er, at tá nýggja bingjuplássið er liðugt, skal ruskið skiljast uppaftur betur, enn nú verður gjørt. Faldari verður sendur í hvørt hús um hetta.
- Vegur til býlingin á **Tvørgarði.** Kommunustýrið hevur samtykt at gera 1.

byggistig av endaligu loysnini (Tvørgarðsgøtu-Ápramsveg) og binda Tvørgarðsgøtu í Gummaldagøtu.
- **Kirkjugarðurin** í Sandavági er um at verða fullur. Støða skal takast til, um rætt er at gera nýggjan kirkjugarð, ella at víðka um verandi.
- Á **Kirkjabø** skulu ymisk viðurskifti fáast í rættlag.
- Ætlanin er at gera økið sunnanfyri **fótbóltsvøllin** í Miðvági meira snotuligt.
- **Vága Ríðingarfelag** arbeiðir við at gera ríðihøll og ríðibreyt úti á Dal.
- **SÍF** arbeiðir við at gera róðrarneyst úti á Bakka í Sandavági.
- Onnur mál, sum hetta kommunustýrið ætlar at fáa avgreidd eru: At hampa **grótbrotini** á Prestlandinum. At hampa meira um á **Nullinum**. Har skal onkur garður laðast. Eisini skal hampast við samlibrunnin til kloakkirnar frá býlinginum í **Sørpum**.

Kommunustýrið roynir í mest møguligan mun at gera arbeiði liðug. Tað hevur tíanverri víst seg, at ov nógvar verkætlanir ikki eru gjørdar lidnar. Kommunan fer við tí arbeiðsorku, sum er tøk, at gera hesi arbeiði liðug. Okkara mál er, at nýggjar verkætlanir skulu í framtíðini gerast heilt lidnar. Kommunustýrið ætlar, at í framtíðini skulu arbeiði bjóðast út í størri mun, enn gjørt hevur verið.

**Arbeiðir, sum gjørd eru í kommununi hettar seinasta árið, eru í høvuðsheitum:**
- Nýggi **barnagarðurin á Stórutrøð** er tikin í brúk. Har eru pláss fyri uml. 150 børnum. Arbeiðið hevur gingið toluliga væl. Onkur snøkil er eftir at gera, serliga uttanum, áðrenn arbeiðið er heilt liðugt.
- **Fótbóltsvøllir**. Nýtt graslíki er í 2011 lagt á fótbóltsvøllirnar bæði í Miðvági og Sandavági. Í Miðvági valdi MB sjálvt at leggja graslíki á við góðum stuðli frá kommununi. Í Sandavági valdi SÌF at lata kommununi sín part av vøllinum. Kommunan hevur síðan lagt graslíki á. Arbeiðini at seta ljósmastrarnar uppaftur og gera girðingarnar, vera væntandi liðug í vár.
- Arbeitt verður við **ferðslutrygdarætlanini** fyri høvuðsvegin gjøgnum Miðvág og Sandavág. Nýggj tilkoyring er í 2011 gjørd til Valloyrarveg. Ætlanin er, at framyvir skulu bussar, sum hava ørindi í Sandavági, koyra henda vegin. Bæði Landsverk og kommunan hava sett **bilverjur** upp ymsastaðni í kommununi, har tørvur var mettur at vera á tí. Kommunustýrið hevur heitt á Landsverk um, sum næsta punkt í hesi verkætlan, at bøta um trygdina á vegamótinum Giljavegur – Hammershaimbsvegur.
- **Miðstaðarøkið í Sandavági** er nú liðugt. Onkur snøkil kemur tó afturat seinni. Eisini verður arbeitt við at hampa um í **viðarlundini** og at laða garð á **Sjóberinum**.

- Nøkur økir eru **asfalterað** í 2011, mest norðuri í Heiðum. Ætlanin var at asfaltera fleiri gongubreytir í Sandavági eisini, men Landsverk kláraði ikki at gera arbeiðini í 2011, tí verða tey gjørd í 2012 í staðin. Áðrenn gongubreytin á Giljavegi verður asfalterað, verða kantsteinarnir skiftir út.
- Arbeiðið at leggja **vatnleiðing** frá reinsiverkinum í Miðvági til **Vatnsoyrar**, er nú komið so væl áleiðis, at hon verður tikin alment í nýtslu fyrsta dagin. Øll húski í kommununi fáa tá sóttreinsað vatn.
- Spæliplássið **Norðuri í Heiðum** er nú so gott sum liðugt. Fólkið í býlinginum hevur gjørt arbeiðið, og kommunan hevur rindað fyri tilfarið.
- Góðar kreftir hava givið okkum ein minnisvarða yvir mæta skald okkara **Mikkjal á Ryggi**. Minnisvarðin var avdúkaður á Vestanstevnu. Kommunan fer at hampa meira um økið við minnisvarðan.

**Lánini:** Nú so nógv arbeiðir eru gjørd og eru í gerð, hevur verið neyðugt at hækka lánini. Tó eiga vit eisini nakrar krónur á bók. Niðanfyri hava vit sett gongdina síðan 1995:

| Lán | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Mill. kr.** | **95/98** | **2002** | **2004** | **2006** | **2008** | **2009** | **2010** | **2011** |
| **Miðvágur** | 47,9 | 17,6 | 8,7 | 2,5 | 6,0 | 24,8 | 32,7 | 49,6 |
| **Sandavágur** | 9,9 | 5,8 | 3,3 | 1,6 | 10,2 | | | |

| Nettoskuld | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Mill. kr.** | **95/98** | **2002** | **2004** | **2006** | **2008** | **2009** | **2010** | **2011** |
| **Miðvágur** | 46,2 | 6,8 | -2,2 | -7,0 | -4,2 | 16,0 | 23,0 | 45,0 (mett) |
| **Sandavágur** | 4,0 | -2,7 | -5,0 | -4,8 | 3,6 | | | |






**Virksemið:** Arbeiðsplássini í samfelag okkara broytast støðugt. Flestu okkara kundu ivaleyst hugsað okkum, at tað vóru fleiri arbeiðspláss í kommunu okkara. Tó borgarar okkara hava verið raskir at funnið sær arbeiði, tað veri seg innanfyri kommunumark, ella aðrastaðni.
Tíverri liggur **flakavirkið** stilt enn. Tó nú hevur **Luna** keypt virkið, so vónandi hendir okkurt jaligt har í nærmastu framtíð.
**Kovin**, sum hevur verið eitt trygt arbeiðspláss í nógv ár, stongdi í farna ári. Tað kom illa við hjá okkum.
Tíverri hevur **kommunan** eisini verið noydd at skerja starvsfólkatalið nakað.
Hesi viðurskifti, og tað at búskaparvøksturin er støðgaður, hava við sær, at arbeiðsloysið er vaksandi. Okkara vón er, at nógv virksemi aftur verður á havnarøkinum. Eisini vóna vit, at fleiri av borgarum okkara fáa arbeiði, nú kommunan skal byggja nýggjan skúla.

Talið á persónum, sum fáa stuðul frá **Arbeiðsloysisskipanini** sæst niðanfyri:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **2009** | Menn: 22 | Kvinnur: | 26 | Tilsamans: 48 |
| **2010** | Menn: 37 | Kvinnur: | 44 | Tilsamans: 81 |
| **2011** | Menn: 38 | Kvinnur: | 48 | Tilsamans: 86 |

Ikki er alt tó neiligt á tí vinnuliga økinum. SP/f **Thorfinn Nielsen** hevur bygt nýggjan virkisbygning á Hillingatanga. Hetta gevur teimum betri umstøður, og fer vónandi at gagna virkinum almikið.
**Sjóvinnustýrið** hevur økt um virksemið sítt, og fer hetta vónandi at økjast enn meira í árunum, sum koma.

**Skattskylduga** inntøkan í kommununi, sum hevur vaksið støðugt seinastu nógvu árini, støðgaði á í 2009, men veksur nú aftur sum víst niðanfyri:

| Miðvágur | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **1995** | **1996** | **1997** | **1998** | **1999** | **2000** | **2001** | **2002** |
| **Mill.** | 77,1 | 81,2 | 86,7 | 88,7 | 95,8 | 111,6 | 114,2 | 129,2 |

| **Ár** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** | **2010** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Mill.** | 136,1 | 138,3 | 141,6 | 158,6 | 174,1 | 179,8 | 176,1 | 189,4 |

| Sandavágur | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **1995** | **1996** | **1997** | **1998** | **1999** | **2000** | **2001** | **2002** |
| **Mill.** | 57,2 | 59,5 | 63,2 | 65,5 | 72,3 | 81,0 | 82,7 | 93,3 |

| **Ár** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** | **2010** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Mill.** | 96,5 | 97,2 | 105,0 | 116,5 | 127,9 | 135,8 | 136,0 | 143,0 |




Skatturin verður ikki endaliga uppgjørdur fyrr enn í oktobur árið eftir, so tølini fyri 2011 kenna vit ikki enn.

**Skattaprosentið:** Sum greitt er frá, liggja sera stórar avbjóðingar fyri framman hjá kommununi. Við atliti til hesar, samtykti kommunustýrið at skattaprosentið framhaldandi skal vera **22,5%.**

**Barnafrádrátturin** í 2012 verður tann sami, **kr. 4.000,-** fyri hvørt barnið.

**Roknskapurin**: Niðanfyri hava vit víst ársúrslitið áðrenn fígging í ávikavist Miðvágs og Sandavágs kommunum, og frá 2009 í Vága kommunu.

| Roknskapurin - javnvág | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ár / mill. kr** | **1995** | **1996** | **1997** | **1998** | **1999** | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** |
| **Miðvágur** | 17,9 | 14,3 | 15,1 | 17,6 | 17,3 | 22,7 | 20,0 | 21,3 | 22,1 |
| **Sandavágur** | | | | 11,8 | 12,8 | 16,4 | 14,3 | 17,5 | 18,3 |

<table>
<tr><th>Ár / mill. kr</th><th>2004</th><th>2005</th><th>2006</th><th>2007</th><th>2008</th><th>2009</th><th>2010</th><th>2011</th><th>2012</th></tr>
<tr><td>Miðvágur</td><td>23,0</td><td>23,0</td><td>27,2</td><td>32,1</td><td>35,8</td><td rowspan="2">65,2</td><td rowspan="2">62,4</td><td rowspan="2">74,0<br>(mett)</td><td rowspan="2">71,9<br>(ætlan)</td></tr>
<tr><td>Sandavágur</td><td>16,6</td><td>18,3</td><td>23,9</td><td>25,2</td><td>35,7</td></tr>
</table>




**Fólkatalið**, sum minkaði nógv í kreppuárunum, er komið uppaftur á eitt meira natúrligt støði. 31/12 búðu 1964 fólk í Vága kommunu.
Gongdin seinastu árini er víst niðanfyri: (tølini eru pr. 31/12)

| Miðvágur og Vatnsoyrar | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **1989** | **1991** | **1992** | **1993** | **1994** | **1995** | **1996** | **1997** | **1998** | **1999** | **2000** |
| **Fólk** | 1087 | 1045 | 1022 | 994 | 972 | 959 | 958 | 963 | 951 | 953 | 973 |

| **Ár** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** | **2010** | **2011** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fólk** | 1001 | 1024 | 1057 | 1089 | 1102 | 1104 | 1107 | 1123 | 1113 | 1111 | 1108 |

| Sandavágur | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **1989** | **1991** | **1992** | **1993** | **1994** | **1995** | **1996** | **1997** | **1998** | **1999** | **2000** |
| **Fólk** | 758 | 726 | 723 | 693 | 668 | 669 | 662 | 674 | 682 | 689 | 677 |

| **Ár** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** | **2010** | **2011** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fólk** | 689 | 722 | 730 | 739 | 767 | 797 | 805 | 833 | 826 | 832 | 856 |




**Barnaansingin**: Miðvágs- og Sandavágs kommunur hava nú í fleiri ár nøktað tørvin á barnaansing. Í heyst var nýggi barnagarðurin, **Miðgarður**, á Stóru Trøð í Miðvági tikin í nýtslu.
Barnaansingin í Miðvági er skipað soleiðis, at øll børn upp til skúlaaldur verða ansað í **Miðgarði**. Í Sandavági verða øll børn upp til skúlaaldur ansað í **Sóljugarði**.
Øll **frítíðaransing** í kommununi er nú løgd saman, og heldur til í Gamla Skúla í Miðvági, sum hevur fingið navnið **Smílikullan.**
Útreiðslurnar av barnaansingini eru vaksnar stútt, síðan ansingin byrjaði. Niðanfyri vísa vit gongdina:

| Miðvágs kommuna | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **1995** | **1996** | **1997** | **1998** | **1999** | **2000** | **2001** |
| **Mill. kr.** | 0,974 | 0,917 | 1,025 | 1,290 | 1,437 | 1,635 | 2,226 |
| **Ár** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** |
| **Mill. kr.** | 2,798 | 3,469 | 5,366 | 6,222 | 7,044 | 8,026 | 8,500 |

| Sandavágs kommuna | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **1995** | **1996** | **1997** | **1998** | **1999** | **2000** | **2001** |
| **Mill. kr.** | | | | 0,884 | 1,096 | 1,407 | 1,922 |
| **Ár** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** |
| **Mill. kr.** | 2,296 | 2,967 | 4,296 | 4,984 | 6,160 | 7,286 | 8,228 |

| Vága kommuna | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **2009** | **2010** | **2011** | **2012** | 2012 er fíggjarætlan |
| **Mill. kr.** | 14,750 | 14,858 | 15,800 | 15,017 | |

Afturat hesum rindaði kommunan í 2011 góðar kr. 2,1 mill. til barnaverndartænastuna og kr. 580.000 til ungdómshúsið Loftið.



**Ungdómshúsið Loftið** byrjaði sítt virksemi í januar 2007. Ætlanin við einum ungdómshúsið var at bjóða øllum ungum frá 4.fl. og eldri eitt øðrvísi forum í teirra frítíð, har tey kunna verða saman við sínum vinfólki, og læra onnur ung at kenna.
Loftið er eisini eitt stað, har tey ungu hava møguleika at spæla ymisk spøl, hyggja eftir filmi, spæla gittar, keypa sær okkurt at eta o.s.fr.
Høvuðsendamálið er at bjóða teimum ungu eitt stað, har tey trívast, fáa kreativitetin í hásæti, felags og persónligar upplivingar, har tey kunna práta um alt og einki saman við teimum vaksnu, sum arbeiða her.

Skipað verður fyri **fimleiki fyri pensionistar á Sýnini**. Hetta tiltak hevur fingið sera stóra undirtøku og frøast vit um tað.

**Kommunuskrivstovan** í Miðvági og ungdómshúsinum **Lofti** verða nýtt til tilkomin fólk frá 55 árum og uppeftir at samlast í. Hetta verður gjørt i sambandi við eitt tiltak **OLE2 (Okkara Lív sum Eldri),** sum kommunan er partur av. Í Sandavági hevur virksemi verið í heyst, meðan ætlanin er at byrja aftur í Miðvági beint eftir nýggjár.
**Vága Listastova** heldur til í **Várgleði**. Ætlanin er, at møguleiki skal vera hjá listafólki í Vágum at samlast her regluliga at mála.

Vit fegnast um, at fleiri at **ítróttarfólkum** okkara hava fingið sera góð úrslit í árinum, sum fór. Tó høvuðsendamálið við ítróttini er tann sosiala samveran.

**Djóraupptøkufólk**. Samstarvsavtala er gjørd millum Føroya Landfúta og Vága kommunu um upptøku av leysum hundum og um upptøku av øðrum dýrum í Vága kommunu.
Um fólk eru varug við leysgangandi hundar ella onnur dýr, eiga tey at boða politinum frá. Hetta kann gerast "anonymt". Politiið setir seg so í samband við djóraupptøkufólkið.

| **Bingjuplássini eru opin hesar tíðir** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag | Leygardag |
| **Miðvágur**<br>Tlf. 212675 | | 18 – 19 | | 17 - 19 | 14 – 16 |
| **Sandavágur**<br>Tlf. 794472 | 17 - 18 | | 17 – 18 | 17 - 19 | |

Upplatingartíðirnar eru eisini á heimasíðuni vaga.fo og í IRF kalendaranum.

Allir borgarar í kommununi kunnu ***frítt*** lata avfall frá húsarhaldinum á bingjuplássini. Ikki er loyvt at koma við størri nøgdum enn einum rúmmetri um ferðina, uttan frammanundan at hava avtalað hetta við tann, sum passar bingjuplássið, tí annars er skjótt, at nøkur fá fólk fylla bingjurnar, meðan onnur ikki sleppa av við sítt avfall.

**Hálka** er ein trupulleiki um vetrarnar. Í hálku hevur kommunan nú í nøkur ár stroytt salt á teir vegir, har mest ferðsla er. Eisini er kavi grivin eftir førimuni.
Kommunan hevur sett nakrar saltkassar við ymsar brekkur í bygdunum. Kassarnir eru myrkagrønir, og ein spaki liggur í hvørjum. Ætlanin er at fólk, sum brúka brekkurnar, sjálvi skulu stroya salt á, tá gler er, og kommunan ikki hevur nátt at salta.

**Kommunustýrið** hevur havt 17 fundir í 2011 og hevur viðgjørt 181 mál, fíggjarnevndin hevur havt 15 fundir og viðgjørt 150 mál, tekniska nevnd hevur havt 13 fundir og viðgjørt 183 mál, trivnaðarnevndin hevur havt 14 fundir og viðgjørt 45 mál og mentunarnevndin hevur havt 13 fundir og viðgjørt 59 mál.

**Avgreiðslutíðirnar á kommunuskrivstovuni eru:**
**Mánadag til fríggjadag frá kl. $10^{00}$ til $15^{00}$**

**TAÐ BER TIL AT FÁA AVTALU UM FUND VIÐ BORGARSTJÓRAN VIÐ AT VENDA SÆR TIL SKRIVSTOVUNA Á TLF. 34 44 00 MILLUM KL. $13^{00}$ OG $15^{00}$.**

**Hetta** var í høvuðsheitum gongdin í 2011. Tey, sum ynskja at vita meira, eru vælkomin á kommunuskrivstovuna at fáa fleiri upplýsingar.

Vit eru nú í einum nýggjum tíðarskeiði, har vit úr Miðvági, Sandavági og Vatnsoyrum hava tikið okkum saman í eina felags **Vága kommunu.**
Vit vænta eitt gott og mennandi samstarv til gagns fyri allar borgarar okkara. Hóast nógv verður tosað um heimsbúskapin í hesum døgum, vilja vit framhaldandi við dirvi líta frameftir og ikki missa mótið. Við tí virkisfúsa fólki, sum her býr, vilja vit saman taka lógvatak. Soleiðis standa vit sterkari.

*Vit takka borgarum okkara fyri tann stuðul og positiva anda, sum tit hava víst kommunustýrinum.*

*Gott nýggjár og Guds signing  ynskja vit tykkum øllum.*

*Sandavági, tann 31. desembur 2011*

